# TANNARØKTARI

Kommunala barnatannarøktin á Tvøroyri søkir eftir tannarøktara at byrja 1. februar 2007. Tannarøktin umfatar børnini í Suðuroyar norðaru helvt frá 0-16 ár.

**Starvið**
Tannarøktarin skal gera fyribyrgjandi viðgerðir á tannlæknastovuni, og taka sær av upplýsandi/fyribyrgjandi arbeiði á skúlum og dagstovnum.

**Faklig førleikakrøv**
Útbúgving sum tannarøktari.
Fyrimunur at hava royndir frá kommunalari tannarøkt og fyribyrgjandi arbeiði.

**Persónlig førleikakrøv**
- Hava lætt við at tosa við børn og foreldur.
- Hava hug til at arbeiða við børnum.
- Duga væl at samstarva.
- Vera sjálvstøðugur í sínum arbeiði.

**Løn og setanartreytir**
Løn sambært avvarandi yrkisfelag og kommununa. Starvið er eitt nýupprættað hálvtíðarstarv við eini royndartíð uppá eitt ½ ár , orsakað av hølisviðurskiftunum.

**Gjøllari upplýsingar um starvið**
Kunnu seta seg í samband við Rutt Jensen klinikkstjóra tlf. 371216.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, CV og møguligum viðmælum, skulu vera Barnatannarøktini í hendi í seinasta lagi 19. jan. 2007.

Umsóknin skal sendast til:
**Kommunala Barnatannarøktin**
**800 Tvøroyri**

TVØROYRAR KOMMUNA

# kall Cup 2007

## HB bjóðar øllum dreingjum og gentum at gera lið til innandurakapping í fótbólti, í høllini á Hálsi í døgunum 19.-20. januar.

| Aldursbólkar | Føðiár |
|---|---|
| Gentur 10-12 | 95-96 |
| Smágentur 12-14 | 93-94 |
| Gentur 14-17 | 90-91-92 |
| Pinkulingar | 99-00 |
| Smápiltar | 97-98 |
| Piltar | 95-96 |
| Smádreingir | 93-94 |
| Dreingir | 91-92 |

Seinasta freist at melda seg til er **mikudagin 17. januar kl. 20.00.**

**Tilmelding hjá:**
Oddmar Andreasen
Tel 310760 / 585300
ella á hb@hb.fo

Á hvørjum liði eru 5 leikarar. Í deildunum gentur 14-17 og dreingir eru bert 4 leikarar. Loyvt er at hava ein skiftisleikara. Luttøkugjaldið er 200 kr. fyri hvørt liðið. Liðini skulu hava fótbóltsnøvn. 3 tey fremstu liðini í hvørjum aldursbólki fáa heiðursmerki. Allir luttakararnir fáa lítla gávu frá Kall

HAVNAR BÓLTFELAG 1904

## Havnar Bóltfelag

# KOKKUR

**Søkt verður eftir royndum kokki at standa fyri matgerðini í køki okkara, at byrja beinanvegin.**

**Arbeiðstíðin er:**
**mánadag - fríggjadag kl. 8-13**

*Keypmaðurin "úti í Grønlandi"*
*JOHANNES ANDREASEN*
Grønlandsv. 16 · FO-100 Tórshavn · tlf. 31 20 87

# Pedagogur/hjálparfólk til Barnagarðin Eikilund

Søkt verður eftir Pedagogi/hjálparfólki til barnagarðin Eikilund í Vági, ið skjótast tilber í tíðaravmarkað starv.

**Starvið umfatar:**
At arbeiða 35 tímar um vikuna.

Vit ynskja, at tú dugir at skapa ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag saman við børninum:
- Dámar væl at verða úti
- Ert kreativur
- Hevur gott foreldra og starvsfólkasamstav.

**Lønarviðurskifti:**
Starvið er lønt sambært sáttmálanum millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Pedagogfelag.

**Meir fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Unn Michelsen á tlf. 373383 ella Petry Joensen á tlf. 373024/228718.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 26. januar 2006 kl. 12.00. Merk umsóknina »pedagogur/hjálparfólk«.

Um eingin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett ístaðin.

**Vágs Kommuna**
Mentunarnevndin

FØROYA HANDILSSKÚLI

# VASKIFÓLK

## til Føroya Handilsskúla í Tórshavn

Søkt verður eftir vaskifólki 18 tímar um vikuna. Vaskað verður í tíðarbilinum kl. 15.00 til 17.30.

Nærri uppslýsingar fáast við at ringja til Zacharias Johansen, húsavørð tlf. 224693.

Løn sambært sáttmála hjá Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Skrivlig umsókn, at senda til :

**Føroya Handilsskúla**
Postsmoga 177
110 Tórshavn

# KOYRIKORT?

## EYSTUROYINGAR

**Nýtt teoriskeið byrjar mikudagin 10. januar 2007 kl. 18:00.**

**Tilmelding hjá:**

| | |
|---|---|
| Hugo Kristiansen | 225225 |
| Jari Lykke | 503002 |
| Mikkjal Hansen | 722578 |




**EYSTUROYAR TEORISKÚLI**